# INNIHALDSYVIRLIT

## I. KAPITTUL
**UMSITINGARLIGAR FYRISKIPANIR.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Økið, sum byggisamtyktin fevnir um | 3 |
| 2. gr. | Byggivaldið | 3 |
| 3. gr. | Bygging og byggingar | 3 |
| 4. gr. | Byggiumsóknir | 4 |
| 5. gr. | Byggifulltrúi | 5 |
| 6. gr. | Byggiloyvi og byggiváttan | 6 |
| 7. gr. | Umsiting og niðurtøka av bygging | 7 |
| 8. gr. | Trygdartiltøk, meðan bygt verður | 7 |
| 9. gr. | Revsing fyri brot á fyriskipanirnar | 8 |
| 10. gr. | Undantaksloyvi | 9 |
| 11. gr. | Kæra | 9 |


## II. KAPITTUL
**FRÁRENNING OG VATNVEITING.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Frárenning | 10 |
| 2. gr. | Broytingar í frárenningum, sum eru | 10 |
| 3. gr. | Vatnveiting | 10 |


## III. KAPITTUL
**ÓBYGDU ØKINI.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Tilhaldspláss | 11 |
| 2. gr. | Gerð og umsiting av tilhaldsplássum | 11 |
| 3. gr. | Øki til bilstøðlar | 11 |
| 4. gr. | Atgongd frá vegi til óbygd øki | 12 |


## IV. KAPITTUL
**BYGGIFYRISKIPANDI ÁSETINGAR.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Útstykkingar og støðd á grundstykkjum | 13 |
| 2. gr. | Nýtingarstig o.a. | 13 |
| 3. gr. | Útrokning av byggistigum, nýtingarstigum o.a. | 14 |
| 4. gr. | Byggihædd og fráleikar | 14 |
| 5. gr. | Bygging, ið er | 16 |
| 6. gr. | Raðhús og onnur samanbygd hús | 16 |

**V. KAPITTUL**
**VEGIR.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Orðaskiljingar | 17 |
| 2. gr. | Um at leggja av til og gera vegir | 17 |
| 3. gr. | Byggilinjur | 18 |
| 4. gr. | Ymisk loyvi til nýtslu av vegum | 18 |
| 5. gr. | Hornaavskurðir og útsýnisøki | 18 |
| 6. gr. | Avtøka av vegum | 19 |
| 7. gr. | Girðing móti vegi | 19 |


**VI. KAPITTUL**
**AÐRAR ÁSETINGAR.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Ásetingar viðvíkjandi húsabygging | 20 |


**VII. KAPITTUL**
**ÁSETINGAR FYRI TEY YMISKU ØKINI.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Almennar fyriskipanir | 21 |
| 2. gr. | Ásetingar fyri A-økini | 21 |
| 3. gr. | Ásetingar fyri B-økini | 22 |
| 4. gr. | Ásetingar fyri D-økið | 23 |
| 5. gr. | Ásetingar fyri E-økini | 24 |
| 6. gr. | Ásetingar fyri F-økini | 25 |
| 7. gr. | Ásetingar fyri G-økini | 25 |
| 8. gr. | Ásetingar fyri H-økini | 25 |
| 9. gr. | Ásetingar fyri J-økini | 26 |


**VIII KAPITTUL**
**ÚTGANGUR.**


| | | |
|---|---|---|
| 1. gr. | Broytingar í byggisamtyktini | 27 |
| 2. gr. | Samtyktar- og góðkenningarátekning | 27 |

# ALMENNAR ÁSETINGAR FYRI BYGGISAMTYKTINA

## I. KAPITTUL
## UMSITINGARLIGAR FYRISKIPANIR.

### 1. gr. Økið, sum byggisamtyktin fevnir um.

1. Henda byggisamtykt fevnir um alla Nes Kommunu og er galdandi í tann mun, annað ikki er ásett við serstøkum byggisamtyktum fyri partar av kommununi.

### 2. gr. Byggivaldið.

1. Byggivaldið í Nes Kommunu hevur bý~~ygda~~ráðið sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir (tekniska nevnd bý~~gda~~ráðsins).

2. Byggifulltrúin hevur bý~~ygda~~ráðsins vegna eftirlit við, at byggireglugerðin og byggisamtyktin (byggisamtyktirnar) verða hildnar og umsitur tær. Har, niðanfyri stendur "byggifulltrúi," er hetta at skilja sum býarverkfrøðingurin ella hjálparmaður hansara, sum røkir umsitingina.

### 3. gr. Bygging og byggingar.

1. Ásetingar í byggisamtyktini galda fyri:
   a) Nýggja bygging
   b) Umbygging av/ella bygging afturat húsum.
   c) Broyting í nýtslu av bygging, sum er og sum hevði komið undir hesa samtykt, um hon var nýbygging.
   d) Byggingar, sum eru, tá ið tær einstøku reglurnar beinleiðis heimila hetta.

2. Til bygging verður roknað:
   a) Fastar konstruktiónir og virki, sum eftir fyritreytunum í byggisamtyktini eru at skilja sum bygging.
   b) Flytandi konstruktiónir eitt nú tjøld, bátar, vognar ella tílíkt, tá ið nýtsla teirra sum bygging ikki bert er fyribils.
   c) Tangar, kranar, flutningsbrýr, pallar og aðrar konstruktiónir í tann mun, sum bý~~gda~~ráðið (tekniska nevnd) heldur vera náttúrligt, tá ið hugsað verður um almennan tryggleika, skil, heilsu ella onnur viðurskifti, sum byggisamtyktin er ætlað at røkja.

3. Byggingar, sum eru, mugu ikki við broyting, um/ella afturatbygging, hækkan ella á annan hátt verða broyttar soleiðis, at tær stríða ímóti galdandi reglum ella, um so skuldi verið, fara at stríða enn meira móti hesum reglum, enn tær longu gera.

4. Skulu byggingar, sum eru, verða umvældar ella broyttar so nógv, at øll byggingin yvirhøvur verður endurnýggjað (høvuðsumbygging), skal arbeiðið verða gjørt soleiðis, at byggingin mest samsvarar við tær reglur, ið galda fyri nýbygging.

5. Nýbygging, broytingar, um-/ella afturatbyggingar og høvuðsumbygg-ingar skulu, umframt at lúka treytirnar í hesi byggisamtykt, eisini vera í samsvari við møguligar býarskipanir, serligar byggisamtyktir, sertreytir, har kommunan er ákæruvald, og lógir annars.

**4. gr. Byggiumsóknir.**

1. Farið kann ikki verða undir arbeiði, ið kemur undir reglurnar í byggisamtyktini, uttan skrivligt byggiloyvi.

2. Allar útstykkingar - og byggiumsóknir, her uppi í umsóknir um at grava fyri grund til møguligar spreingingar, meiri týðandi broytingar, eitt nú at broyta skap og konstruktión, seta upp eldstaðir, taka niður ella flyta hús, vega-, kloakk- og frárenningararbeiði, skulu um býygdaráðið verða sendar byggifulltrúanum.

3. Umsókn skal vera skrivlig, og hjálagdar henni skulu vera tær tekningar og aðrar upplýsingar, ið neyðugar eru til greitt at skilja málið og til holla avgerð av tí umsøkta.

4. Tekningar og útrokningar skulu verða gjørdar av fólki, sum eru før til tess, av byggifrøðingum, arkitektum, verkfrøðingum, teknikarum ella øðrum, sum byggivaldið metir hava nóg góðan kunnleika til tess, og um tekningar og útrokningar teirra lúka tey krøv, ið vanliga verða sett til tekniska projektering.

5. Allar tekningar, planir, frágreiðingar, útrokningar o.t. fylgiskjøl til byggi-umsókn skulu vera dagfest, hava matr. nr. á ognini, og hann, ið uppsett tey hevur, skal skriva undir í høgra horni. Hesin hevur ábyrgd av, at tey eru fullgóð.

6. Sum fylgiskjøl við umsóknini skulu vera hjáløgd:
   a) Støðumynd í minsta lagi 1:1000 (t.d. 1:500 ella 1:200), sum vísir støðd og skapilsi á byggigrundini, hvussu hon vendir móti gøtum og ættum, hvar og hvussu ætlað hús skulu standa, ætlaða vatnburturveiting og hvar hús á grannagrund standa.
   b) Støðumynd skal somuleiðis geva upplýsingar um verandi og framtíðar hæddarstig á grundini, og um tað verður hildið neyðugt fyri at avgreiða málið, hæddarstigini á grannagrundunum.
   c) Flatmyndir og tekningar av øllum útsíðum á húsum í máti í minsta lagi 1:100 við áskrivaðum mátum, bæði høvuðsmátum og gjøgnumgang-andi stakmátum. Skilast skal til, hvat rúmini eru ætlaði til. Møgulig burðarløg skulu verða teknað og sperrurnar vístar. Eisini skulu dyr, saniterar innleggingar o.a. verða teknaðar.
   d) Tvørskurðir í minsta lagi 1:50, sum neyðugir eru fyri at fáa eina fatan av húsunum.

e) Frágreiðingar sambært byggireglugerðini~~a~~, sum, saman við tekningum, gevur fullfíggjaða og greiða lýsing av teirri ætlaðu bygging.

7. Byggifulltrúin kann skipa fyri, at stakprojekteringar saman við útrokningum skulu vera til taks og innsendar til góðkenningar, áðrenn farið verður undir bygging.

8. Umsóknir við tekningum, frágreiðingum og útrokningum - her uppi í ein útrokning av byggistigi og/ella nýtingarstigi - og onnur fylgiskjøl skulu verða innsend í tveimum eintøkum og skulu hava allar upplýsingar, sum neyðugar eru fyri greitt at skilja og fáa avgjørt tað, sum søkt er um.
   Frávik frá lógum, samtyktum, servituttum og øðrum fyrisetanum - her uppi í møguligar býarskipanir - skulu greiniliga verða tilskilað. Samstundis skal verða upplýst, um loyvi til frávik er fingið. Slík frávik eru bert roknað fyri játtað, tá ið tey hava verið nevnd í umsóknini og tilskilað er í byggiloyvinum, at tað neyðuga loyvið ella undantaksloyvið er givið, sí 6. grein, stk. 7.

9. Annað eintakið verður varðveitt hjá kommunuumsitingini, meðan hitt verður sent umsøkjaranum aftur við áteknaðum byggiloyvi ella játtan til tað, ið søkt verður um.

**5. gr. Byggifulltrúi.**

1. Útstykkingar- og byggiumsóknir verða um bý~~ygda~~ráðið sendar byggifulltrúanum, sum viðger tær sambært ásetingunum í byggisamtyktini, áteknar tær sambært nevndu ásetingum og leggur tær fyri bý~~ygda~~ráðið (teknisku nevnd bý~~ygda~~ráðsins).
   Tá málið er endaliga avgreitt av bý~~ygda~~ráðnum og/ella teknisku nevnd, boðar borgarstjórin skrivliga umsøkjaranum frá endaligu samtyktini málinum viðvíkjandi.

2. Er í einum máli talan um nýgerð ella umlegging av vegum, bryggjum, vatn- ella kloakkleiðingum ella øðrum tekniskum leiðingum, skal ummæli fáast frá byggifulltrúanum, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

3. Í málum viðvíkjandi bygging av niðanfyri nevnda slag skal byggifulltrúin útvega neyðugar upplýsingar og loyvi frá øðrum avvarðandi myndugleikum, áðrenn málið verður lagt fyri teknisku nevnd til viðgerðar. Tekniska nevnd leggur hesi mál fyri bý~~ygda~~ráðið til endaliga avgreiðslu:
   a) hús eins og stór rúm til ídnaðar-, goymslu-, verkstaðar- ella handilsvirki.
   b) kirkjur, leikhús, gistingarhús, hús ætlað til undirvísingar, til heilsu- og sjúkrahúsverkið, til framsýningar ella til stuttleika og yvirhøvur hús ella stór høli, har nógv fólk kemur saman.

   Í omanfyri nevndu málum kann byggiloyvi gevast treytað av øllum krøvum, sum hava góðar grundir fyri sær viðvíkjandi gerð, heilsu, eldsvanda, umhvørvi ella býarskipan, og í álitinum frá byggifulltrúanum skal tí verða gjølla greitt frá slíkum krøvum, sum byggifulltrúin heldur vera neyðugt.

4. Byggifulltrúin kann krevja at fáa allar upplýsingar, sum neyðugar eru til í øllum lutum at meta um eina framlagda byggiætlan, her íroknað eftir umstøðum eina heildarbyggiætlan fyri tað virkið, talan er um.

5. Álit frá byggifulltrúanum skal vera til skjals, áðrenn býygdaráðið (tekniska nevnd) tekur avgerð um broytingar ella uppískoyti til hesa byggisamtykt, broytingar í fastsettum byggiøkjum, nýtsla av nýggjum tilfari ella konstruktiónum ella yvirhøvur í málum, har avgerðin er hildin at hava serligan ella grundregluligan týdning.

6. Avgerðirnar hjá teknisku nevnd eru endaligar. Um so er, at ein ella fleiri av limunum í nevndini krevja tað, skal málið leggjast fram fyri býygdaráðið til endaliga avgerð.

**6. gr. <u>Byggiloyvi og byggiváttan.</u>**

1. Byggiloyvið skal vera skrivligt. Makaskjal av byggiloyvinum skal verða goymt í skjalasavninum hjá kommununi.

2. Loyvið kann vera avmarkað til bara at fata um fyrireikingar til bygging: Grevstur fyri grund, spreinging, javnan av lendi, stoyping av undirstøði, veg-, kloakk- og frárenningararbeiði o.s.fr.

3. Loyvið er tíðarbundið til í mesta lagi 2 ár, soleiðis at nýtt loyvi má vera fingið, um ásettu freistirnar ikki eru hildnar.

4. Áðrenn farið verður undir arbeiðið, skal verða boðað byggifulltrúanum frá í góðari tíð, og í loyvinum kunnu verða settar treytir um, at fráboðanin skal vera skrivlig.

5. Í loyvinum kann verða sett sum treyt, at fráboðan skal verða givin byggifulltrúanum, tá ið eitt byrjað arbeiði verður steðgað, og skilað skal verða til, nær ætlanin er at taka arbeiðið uppaftur. Byggifulltrúin saman við Teknisku nevnd býBygdaráðiðsins ger tá av, um nýtt loyvi skal verða fingið og nýtt gjald goldið.

6. Fyri byggiloyvi kunnu verða settar allar treytir, ið hava grundir fyri sær viðvíkjandi dálking, umhvørvi, inngirðing (smb. kap. V. gr. 7), konstruktión, her eisini íroknað, hvussu skipað er fyri tilkoyring, fráseting av vagnum, túni og í eini heildarbyggiætlan fyri avvarðandi øki.
   Byggiloyvið kann somuleiðis vera treytað av trygdartiltøkum (eitt nú girðing, skorðum, skjóltekjum o.ø.).

7. Um so er, at í byggiloyvinum eru tilskilað krøv um, at ásetingar, ið ikki standa í byggisamtyktini, skulu verða loknar, skulu tílík krøv vera tilskilað saman við upplýsing um heimildina fyri teimum, og um so er, at krøvini eru sett av øðrum myndugleika enn byggivaldinum, upplýsing um hetta og um, hvar ein kæra um hesi krøv kann verða send - og møguliga innan fyri hvørja freist.

8. Áðrenn bygging verður tikin í nýtslu, skal vera boðað byggifulltrúanum frá, og váttan hansara - byggiváttan - fáast um, at byggingin í tann mun, staðfesting hevur verið gjørlig, er gjørd í samsvari við byggisamtyktina og tær serstøku treytir, ið settar vórðu, tá ið byggiloyvið varð givið. Ein fingin byggiváttan forðar ikki byggivaldinum í at kunna krevja, at frávik, ið seinni verða funnin, verða rættað. Áðrenn byggiváttan verður givin, ansar byggifulltrúin - møguliga eftir áliti frá heilsunevndini, eisini eftir, at frárenning, kloakk og vegir eru í lagi og - møguliga eftir ummæli frá brunavaldinum - at einki er til hindurs fyri at reisa skorsteinar, eldstaðir og roykrør.

**7. gr. Umsiting og niðurtøka av bygging.**

1. Ein og hvør bygging skal í øllum lutum og við øllum, ið til hoyrir, til eina og hvørja tíð verða forsvarliga hildin og í hampiligum standi. Er bygging serliga illa umsitin, kann byggivaldið áleggja avvarðandi at bøta um brekini og, um neyðugt, lata tey gera fyri rokning eigarans.

2. Verður hildið, at vandi hóttir tey, sum búgva í húsunum ella onnur, kann byggivaldið krevja, at húsini verða byrgd og møguliga, at flutt verður úr teimum ella øðrum húsum.

3. Ikki er loyvt at fara undir at taka niður bygging uttan so, at loyvi er fingið frá byggivaldinum. Í umsókn um slíkt loyvi skal verða skilað til, hvussu høg (hæddir) og víð (vídd á húsagrund) byggingin er.

4. Niðurtøku- og byggiarbeiði skulu fara fram á tryggan hátt og samsvarandi teimum fyriskipanum, sum byggivaldið í tí einstaka førinum gevur. Soleiðis eisini, tá ið um ræður at beina burtur ella hylja undirstøðið o.a. á vegøkinum.

5. Hevur bygningur innleggingar til frárenningar, vatn, ravmagn, telefon ella tílíkt, er ikki loyvt at fara undir arbeiðið, fyrr enn avvarðandi myndugleiki ella felag hevur fingið boð um hetta, uttan so, at arbeiðið verður gjørt av alment góðkendum handverkarum.

**8. gr. Trygdartiltøk, meðan bygt verður.**

1. Tá ið grivið ella sprongt verður fyri grund, skal tann, ið byggir, taka til øll neyðug trygdarráð til at verja fyri skaða ella vanda.

2. Hevur múrur ella onnur bygging skotist soleiðis ímóti annans mans ogn, at hesin hevur ampa av tí, so er byggivaldinum heimilað at geva fyriskipan til tess at gera tey trygdartiltøk, ið neyðug eru í viðkomandi føri.

3. Verður hildið neyðugt, meðan byggiarbeiðið fer fram, her íroknað neyðturvilig umvæling ella umsiting, bráðfeingis at loyva atgond inn á annans mans grund ella at seta skorður, stiga, byggipallar, skjóltak ella tílíkt á hana, inn yvir hana ella á hús á henni, er byggivaldinum heimilað at loyva tí við hóskandi fyrivarni og í tann mun, neyðugt er, at geva loyvi

til at ráða yvir annans mans ogn. Meðan loyvið frá byggivaldinum verður nýtt, má hetta vera til minst møguligan ampa fyri eigaran ella brúkaran av grannaognini. Ognin skal, tá ið tílík nýtsla heldur uppat, sum skjótast verða sett í sama stand sum áður.

### 9. gr. <u>Revsing fyri brot á fyriskipanirnar.</u>

1. Sektaður verður
   a) hann, sum uttan fyrisett loyvi ávirkar nakað arbeiði, sum kemur undir fyriskipanirnar í byggisamtykt.
   b) hann, sum letur vera at geva byggifulltrúanum boð, sum fyrisett er.
   c) hann, sum fer at nýta bygging uttan fyrisetta váttan.
   d) hann, sum tálmar eftirkanning, ið er heimilað í lóg.
   e) hann, sum ikki ger eftir ló~~ø~~gliga frásøgdum boðum.
   f) hann, sum letur vera við at gera tey umsitingararbeiði, sum byggivaldið hevur álagt, og sum er neyðugt til tess at sleppa undan, at vandi stendst av fyri tey, sum búgva í húsunum ella onnur.
   g) hann, sum brýtur fyriskipanir í hesi almennu byggisamtykt og aðrar serligar fyriskipanir, sum landsstýrið hevur góðkent, uttan at brotið kann verða talt undir a-f.

2. Rættarábyrgd fyri ólló~~ø~~gliga bygging hevur hann, ið staðið hevur fyri arbeiðnum, ella hann, ið gjørt tað hevur, eftir umstøðunum báðir. Hann, sum hevur latið arbeiðið gera, verður bert gjørdur ábyrgdur, tá ið hann ikki veit at siga nakran annan, sum kann verða kravdur at hava rættarábyrgd, ella tá ið hann hevur verið við í brotinum og hevur vitað ella grunað um tann ólló~~ø~~gliga atburðin. Rættarábyrgdin kann tá eftir umstøðunum falla burtur mótvegis teimum, sum nevndir eru í fyrsta setningi.

3. Tað er skylda hansara, sum eigur eina ogn, at rætta tað, sum er ólló~~ø~~gligt á henni.

4. Ger eigarin ikki eftir boðum, hann hevur fingið, kann við dómi verða álagt honum at rætta viðurskiftini, áðrenn ásett tíð er umliðin og noyddur av nóg stórari framhaldandi bót.

5. Snýr brotið seg um nýtslu av ognini, og eigarin hevur givið nýtaranum tey neyðugu boðini um skyldurnar, hevur nýtarin ábyrgdina.

6. Tá ið ikki verður gjørt eftir skyldu, sum er áløgd við dómi, til at rætta ólló~~ø~~glig viðurskifti, áðrenn ásetta tíðarfreistin er umliðin, og tá ið innheinting av sektum, sum dømdar eru sambært 1. stk., ikki verður hildin at fáa tað ætlaða úrslitið, kann byggivaldið krevja hjálp frá løgregluni til at fáa atgongd til at gera tað, sum byggivaldið heldur neyðugt vera til at gera viðurskiftini ló~~ø~~glig, møguliga til niðurtøku.

7. Ongum er heimilað at nokta starvsfólki byggivaldsins ella umboðsfólki tess atgongd, tá ið tey við fullgóðum heimildarprógvi koma til eina ogn at kanna eftir, um og í hvønn mun ein bygging er í samsvar við galdandi lóg, og um ásetingarnar í samtyktini eru hildnar.

8. Verður farið undir arbeiði, sum kemur undir ásetingarnar í hesi samtykt, uttan at fyrisett loyvi er fingið, kann byggivaldið krevja, at løgreglan beinanvegin setur bann fyri, at hildið verður fram við hesum arbeiði.

9. Reglur, reglugerðir, skipanir og ásetingar gjørdar sambært hesi samtykt, ella ásetingar bundnar at tí einstaka byggiloyvinum, skulu vera at rokna fyri partar av byggisamtyktini og hava somu vernd sum hon.

**10. gr.** **Undantaksloyvi.**

1. Býygdaráðið kann geva smávegis lættar í ásetingunum í hesi byggisamtykt.

2. Er ósemja í býygdaráðnum um, hvussu ein lætti er at skilja, tekur landsstýrið avgerð.

3. Tá ið umvarðandi grundir mæla til tess, og tá býygdaráðið hevur havt høvi til at siga áskoðan sína um umsóknina, kann landsstýrið loyva, eftir umstøðunum við gjøllari settum treytum, at vikið verður frá teimum í byggisamtyktini gjørdu ásetingunum.

**11. gr.** **Kæra.**

1. Avgerðir býygdaráðsins sambært hesi almennu byggisamtykt og teimum serstøku byggisamtyktunum er loyvt at skjóta til landsstýrið.

2. Tá ið annað ikki er fyrisett, er kærufreistin 30 dagar frá tí degi, avvarðandi fekk avgerðina at vita og upplýsing um hesa freist og um, hvat vald kært kann verða til. Fyri avgerðir, sum alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.

3. Kæra um boð, sum byggivaldið hevur givið, sleppur einum ikki frá at gera eftir teimum. Tó er kæruvaldinum heimilað at áseta, um kæra skal leingja um freistina.

4. Sakarmál til tess at royna avgerðir, sum landsstýrið hevur tikið samsvarandi teirri almennu byggisamtyktini og teimum serstøku byggisamtyktunum, skal verða reist, áðrenn 6 vikur eru gingnar frá tí degi, tá ið avgerðin er fráboðað avvarðandi. Viðvíkjandi avgerðum, sum alment eru kunngjørdar, verður kærufreistin roknað frá kunngerðardegnum.

**II. KAPITTUL**
**FRÁRENNING OG VATNVEITING.**

**1. gr. Frárenning.**

1. Hvør nýggj bygging skal hava fullgóða frárenning bæði til skitið vatn og til regn-, omaná- og grundvatn.

2. Byggivaldinum er heimilað, nær tað so er, at krevja framd tey neyðugu tiltøk, ið nevnd eru í byggiloyvinum. Ger hetta tað neyðugt, at frárenning verður løgd um annan mans grund, skal húseigarin vissa sær, at tær neyðugu avtalurnar um hetta verða tinglisnar á avvarðandi ognir.

3. Tá ið undirstøði verða gjørd tætt hjá ella yvir leiðingum, sum liggja frammanundan, skulu hesar verða vardar, og atgongd til reinsingar, møguliga til at leggja tær berar, skal verða tryggjað á slíkan hátt, sum byggivaldið góðkennir.

4. Tá ið kanningar, her uppi í at leggja leiðingar berar og tílíkt, ætlast neyðugar til tess at finna orsøkina til brek á frárenningini í eini ogn, kann byggivaldið lata gera tey arbeiði, sum neyðug eru, bæði á avvarðandi og á grannaognum. Verða tá funnin løstir ella brek, ið heilt ella lutvíst ætlast at vera atvoldin til ólagið, skal tann, sum er atvoldin til ólagið, endurgjalda byggivaldinum eftir rokning tær útreiðslur, sum standast av teimum gjørdu kanningunum og arbeiðunum.

5. Gerð og nýtsla av frárenningum frá ognum við tí frárenningarútbúnaði, sum hartil hoyrir, skulu lúka tær fyriskipanir og treytir, sum byggivaldið setur.

6. Ein kloakk má ikki verða nýtt á annan hátt, enn ætlað var við henni, tá ið hon varð gjørd, sum til dømis at veita í hana skaðilig evni ella løgir.

7. Reglurnar í 4., 5. og 6. stk. hava eisini gildi fyri frárenningar, sum eru frammanundan.

**2. gr. Broytingar í frárenningum, sum eru.**

1. Kravt kann verða, at frárenningar og frárenningarútbúnaður, sum eru frammanundan, innan fyri tíðarfreist, sum byggivaldið avgerð og tilskilar, verða fingin at samsvara við fyriskipanirnar í 1. grein í hesum kapitli.

**3. gr. Vatnveiting.**

1. Byggivaldið skal ansa eftir, áðrenn farið verður undir nýggja bygging, at hon hevur trygga og nóg góða veiting av drekkivatni, sum skal samsvara við reglurnar í heilsusamtykt kommununar.

2. Annars skal altíð vera nóg góð atgongd til vatn til eldsløkkingar.

**III. KAPITTUL**
**III. KAPITTUL**
**ÓBYGDU ØKINI.**

### 1. gr. Tilhaldsstøðpláss.

1. Við bygging skal verða tryggjað eitt nøktandi tilhaldsstað, sambært ásetingunum í BK17. Hjá sethúsum skal verða tryggjað eitt tilhaldspláss úti, sum er í minsta lagi eins stórt og samlaða hæddarvíddin í sethúsunum.

2.1. Býygdaráðið kann geva fyribils lættar viðvíkjandi hesum reglum í eldri býlingum, til tess hóskandi loysn er fingin fyri eitt størri øki.

3.2. Byggivaldið kann krevja, at til eitt bústaðarøki skal fáast til vega nóg stórt og opið øki bara til tilhaldsstað og spælitún hjá børnum.

4.3. Við bygging, sum heilt ella fyri ein part verður gjørd til vinnulig endamál, kann byggivaldið krevja, at gjørt verður serligt tilhaldsstaðpláss til teirra, sum arbeiða í fyritøkuni.

Formateret: Indrykning: Venstre: 2,25 cm, Hængende: 1,25 cm, Ingen punkttegn eller nummerering

### 2. gr. Gerð og umsiting av tilhaldsplássumtilhaldsstøðum.

1. Óbygd øki, sum eru løgd av og góðkend sum tilhaldsstøðpláss o.s.fr. er ikki loyvt at nýta til annað endamál, enn tað, tey vórðu avløgd til.

2. Tilhaldsstaðpláss, spælitún og øki, sum eru ætlað til ferðslu hjá teimum, ið nýta byggingina ella øðrum, skulu verða hildin í góðum standi, so tey vandleyst fáa verið nýtt til tað, tey eru ætlað.
   Byggivaldið kann seta neyðug umsitingararbeiði í verk fyri rokning eigarans.

### 3. gr. Øki til bilstøðlar.

1. Nóg stórt øki skal verða lagt av til bilstøðlar, soleiðis at íbúgvararnir og tey, sum starvast í húsunum og vitjandi, viðskiftafólk, útvegamenn o.o. fáa sett motorakfør síni frá sær á økinum, ið hoyrir til húsini.
   a) Fyri hús, ið heilt ella fyri ein part verða nýtt til bústað, galda, um annað ikki verður kraft ella góðkent av byggivaldinum, hesi minstukrøv til tess at ganga tørvinum á bilstøðlum á møti.
   b) Við sethús, skal pláss verða gjørt til bilstøðlar til í minsta lagi 3 bilar hjá hvørjum bústaði.
   c) Við sethús í fleiri hæddum og ketu- og raðhús við felags bilstøðlum verður lagt av øki so stórt, at har er pláss fyri 2 bilum til hvønn bústað sær.
   c)d) Við íbúðarbygging skal í minsta lagi gerast pláss til 1,5 bilstøðil or. 75 $m^2$ íbúð – á felags parkeringsøki.

2. Við hús, ið heilt ella lutvíst verða nýtt til vinnu, skal bilstøðlaøkið til vinnulig endamál í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldi-

num, soleiðis at farið verður eftir, hvat vinnan er, talið á starvsfólki og tørvi hjá viðskiftafólki at seta bilar frá sær og tílíkt. Tó skal í minsta lagi vera ein bilstøðil fyri hvørjar 3~~5~~0 m $^2$ av samlaðari hæddarvídd í húsunum.

3. Bilstøðlarnir skulu verða gjørdir, samstundis sum bygt verður.

4. Frávik frá omanfyri standandi ásetingum kunnu verða loyvd, um so er, at neyvari reglur eru fyrisettar í skipan, sum gjørd er av bygdaráðnum.

~~4.~~5. Tá fleiri enn 2 raðhús, randarhús ella íbúðir verða bygdar, skal møguleiki til uppseting av løðistøðum gerast.

**Formateret:** Listeafsnit, Venstre, Ingen punkttegn eller nummerering, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm

**Formateret:** Listeafsnit, Venstre, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm

### 4. gr. Atgongd frá vegi til óbygd øki.

1. Byggivaldið kann krevja, at atgongd ella innkoyring skal vera til óbygt øki. Tann fyriskipaða atgongdin frá vegi til tún skal altíð vera nóg væl upplýst og farandi, og má ikki verða gjørd nýtsla av henni á nakran hátt sum til dømis til bilstøðil, goymslu ella tílíkt, sum er ímóti tí, sum hon var ætlað til.

2. Bjargingaramboðini hjá sløkkiliðnum skulu altíð ótálmað sleppa inn á grundina.

**Formateret:** Listeafsnit, Venstre, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm

3. Portur ella gongd skulu hava elddyggar veggir. Í veggir, loft ella gólv mugu ikki uttan serligt loyvi verða gjørd hurð, vindeygu ella annað op.

**Formateret:** Listeafsnit, Venstre, Ingen punkttegn eller nummerering, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm

## IV. KAPITTUL

IV. KAPITTUL

## BYGGIFYRISKIPANDI ÁSETINGAR.

### 1. gr. Útstykkingar og stødd á grundstykkjum.

1. Byggivaldið kann seta sum treyt, at útstykking einans verður loyvd, um hon hóskar saman við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri náttúrliga avmarkað øki.

2. Nýtsla av ognum.

   Á ognum til vanlig sethúsaøki má ikki vera nakað slag av virki, sum við royki, deymi, gangi, við útsjónd síni ella á annan hátt kann vera teimum til ónáðir, sum uttanum búgva.

3. Grundstykkir til vanlig sethús og tvíhús~~, ið standa fyri seg,~~ mugu ikki verða útstykkjað smærri enn ~~5~~400 m², og grundstykkir til ~~tvíhús,~~ raðhús og íbúðarbygging ~~o.t.~~ ikki smærri enn 175~~400~~ m² fyri hvørj~~ai~~ ~~sethús~~ búeind sær, og grundstykkir til randarhús, mugu ikki verða smærri enn 200 m² fyri hvørja búeind, uttan so, at onnur áseting er gjørd í býarskipan ella serstakari byggisamtykt.

4. Verandi grundstykkir smærri enn 300 m² kunnu bara í serstøkum førum og við loyvi frá býráðnum verða nýtt at byggja sethús á.

### 2. gr. Nýtingarstig o.a.

1. Tá ið onnur áseting viðvíkjandi byggistigi og nýtingarstigi ikki er gjørd í serstakari byggisamtykt, má nýtingarstigið í eini bygging ikki fara upp um:

| | |
|---|---|
| á øki til vanlig sethús: | 0,4~~3~~ |
| á øki til ~~hús í fleiri hæddum,~~ tvíhús, raðhús, randarhús og tílík hús: | 0,5~~4~~ |
| á øki til íbúðarbygging | 0,6 |
| á øki sum, eftir meting byggivaldsins, er eldri, tættbygdur býlingur: | 0,5 |




~~Mynd 4.1~~

Formateret: Listeafsnit, Venstre, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm

Formateret: Indrykning: Første linje: 0 cm

2. Nýtingarstigið á verandi grundstykkjum millum 300 m² og 500 m², uttan fyri eldri, tættbygdar býlingar, kann verða minkað lutfalsliga úr 0,4 fyri 300 m² niður í 0,3 fyri 500 m² sum á omanfyri vístu mynd 4.1.

## 3. gr. Útrokning av byggistigum, nýtingarstigum o.a.

1. *Byggistigið* er lutfallið millum víddina á húsagrundini og víddina á grundstykkinum.

2. *Nýtingarstigið* er lutfallið millum samlaðu hæddarvíddina á allari byggingini og víddina á grundstykkinum. gólvvíddirnar á øllum hæddunum tilsamans, samlaða hæddarvíddin og víddin á grundstykkinum. Gólvvíddin verður máld ímillum útsíður á útveggum.

2.3. Víst verður til Bygningskunngerðina fyri roknihættir o.ø. hesum viðvíkjandi.

Formateret: Listeafsnit, Venstre, Ingen punkttegn eller nummerering, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm + 10 cm

3. Loftshæddin verður roknað sum 50% av stovuhæddini, um hæddin millum sperrufót og kipp er størri enn 2,20 m.

4. Kjallarahæddin verður ikki roknað við til nettonýtingarstig.

5. Fyri vinnubygging verður byggistig og lutfall millum rúmmál á húsum og vídd á grundstykki at laga seg eftir ásetingum fyri líknandi bygging aðrastaðni í landinum.

6. Bilhús, hjallar og onnur úthús telja bara við í útrokning av nýtingarstigi við tí parti av tí samlaðu víddini av hesum bygningum, sum fer upp um 35 m².

7. Um bygt verður uttan kjallara, kann byggivaldið loyva at 10% verða løgd afturat mest loyvdu samlaðu gólvvíddini.

## 4. gr. Byggihædd og fráleikar.

1. Eingin ki á partur av húsum má vera hægri enn, at ljósviðurskiftini verða nóg góð, og at hóskiligt samljóð verður við hús bæði á sama grundstykki og í grannalagnum, og má heldur ikki verða bygt hægri, enn brunatekniskt forsvarráðiligt.

2. Eingi sethús mugu vera hægri enn 8,5 m yvir miðaljørðildi av lidnum lendi mált við húsahornini (mynd 4.2). Niðanfyri veg skal tó onki punkt á húsinum verða hægri enn 5,5m omanfyri lidna veghædd. Stovugólvið má í mesta lagi liggja 30cm omanfyri lidna veghædd.

3. Loft í kjallara má ikki vera meira enn 1,0 m yvir hægsta jørðildi av lidnum lendi við húsahorn (mynd 4.2). Er hæddarmunurin millum hægsta og lægsta jørðildi av lidnum lendi við húsahornini minni enn 1,5 m, er loyvt at hava loft í kjallara 2,5 m yvir lægsta jørðildi (mynd 4.2).

Formateret: Listeafsnit, Venstre, Ingen punkttegn eller nummerering, Beskyt mod enkeltstående linjer, Tabulatorstop: Ikke med 0,5 cm + 0,75 cm + 1,5 cm + 2 cm + 2,25 cm + 2,75 cm + 10 cm

~~3.~~4.







a. Í mesta lagi 8,5m.
b. Í mesta lagi 1,0m, um lendismunurin er størri enn 1,5m.
c. ~~Í mesta lagi 2,5m.~~ Um lendismunurin er minni enn 1,5m millum hægsta og lægsta jørðildi.

Mynd 4.2

~~4.~~5. Um munurin millum lægsta miðal jørðildi við húsahorn og projekteraða vegmiðju er minni enn 4,5 m, kann b~~ýgda~~ráðið geva loyvi til at kotan á loftinum í kjallarahæddini verður upp til veghædd.

~~5.~~6. Um munurin millum lægsta miðal jørðildi við húsahorn og projekteraða vegmiðju er størri enn 4,5 m, skal loftskotan í kjallarahæddini lækkast við muninum sum er størri enn 4,5 m og projekteraða vegmiðju.

~~6.~~7. Einki á húsum, ~~tá yvirskjøldur er undantikin,~~ má vera so høgt at tað:

a) móti granna- og vegamarki er hægri enn: 2,4 m x fráleikan til grannamark og gøtu. (minsti fráleiki til veg og gøtu: 2,5 m – um ikki annað er ásett í góðkendari serskipan fyri ávísa økið) BK17 gr. 2.2.3.2 stk. 1-2.
b) móti aðrari bygging á sama grundstykki er hægri enn 3 m + 0,4 ferðir fráleikanum frá hesi bygging.
c) móti grannamarki er hægri enn 2 ferðir fráleikan til markið.

~~a) móti vegi ella gøtu er hægri enn 0,8 ferðir fráleikan til vegjaðaran hin-umegin vegin.~~
~~b) móti aðrari bygging á sama grundstykki er hægri enn 3 m + 0,4 ferðir~~

~~fráleikanum frá hesi bygging.~~
~~c) móti grannamarki er hægri enn 2 ferðir fráleikan til markið.~~

~~7.~~8. Fráleikin bilskúr, úthús. o.t. bygningar sínámillum og sum hoyra bústaðnum til, somuleiðis fráleikin millum hesar smærru bygningar og sethúsini kann verða minkaður niður í 1 m. Út fyri vindeyga til búrúm og køk skal fráleikin tó í minsta lagi vera 2,5 m.

~~8.~~9. Fráleikarnir, ið umrøddir eru, verða máldir vatnrætt uttan at rokna við jarðarmuni og hornrætt á markið ella bygningin yvirav og til næsta húsahorn.
Hæddirnar, ið umrøddar eru, verða máldar loddrætt og frá miðal jørðildishædd við mark ella hús yvirav.

~~9.~~10. Øll bygging skal vera minst 2,5 m frá marki. Tó kunnu partar av sethúsum koma nærri marki, um teir lúka tær í 10. stk. nevndu treytir, og grannaváttan er hjáløgd byggiumsóknini.
Framsíðan móti vegi skal tó í minsta lagi standa 5 m frá vegi.

~~10.~~11. Bilskúrur, ~~onnur~~ aðrir skúrar, hjallar og úthús kunnu verða bygd nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:
a) Longdin á bygninginum móti grannamarki má ikki vera størri enn 8 m. Vendir bygningurin móti 2 mørkum, má hin longra síðan í mesta lagi vera 8 m og hin stytra síðan í mesta lagi 5,0 m.
b) Bygningur má ikki, um hann er nærri enn 2,5 m frá grannamarki, vera hægri enn 2,5 m.
c) Á grundini má bert verða reistur ein slíkur bygningur nærri grannamarki enn 2,5 m.
d) Eldstaður og skorsteinur mugu ikki vera nærri grannamarki enn 2,5 m.
e) Vindeygu mugu ikki venda móti grannamarki, um tey eru nærri enn 2,5 m.
f) Takvatn skal verða hildið á egnari grund.
g) Veggur móti grannamarki skal vera gjørdur sum eldskjólveggur. Frávik frá hesum er loyvt, tá ið tað ikki veksur um vandan av eldi.

~~11.~~12. Undantøk frá ásetingunum í 2., 6., 9. og 10. stk. kunnu verða loyvd, tá ið bygt verður samsvarandi serstakari byggisamtykt.

~~12.~~13. Byggivaldið kann loyva, at eldverjukambar, skorsteinar og kvistar verða gjørdir oman fyri ló~~ø~~gligan byggiprofil.

~~13.~~14. Byggivaldið kann loyva, at smærri vanlig húsaframskot, eitt nú húsaundirstøði undir jørð, ljóskassar, trappur, brandtrappur, svalar o.t. verða sett út um byggi- og veglinjur, tá fríhædd (hædd upp undir viðkomandi framskot) - har tílík er (brandtrappur, svalar) - er í minsta lagi 2,5 m.

**5. gr. Bygging, ið er.**

1. Byggisamtyktin forðar ikki fyri, at verandi ló~~ø~~glig bygging verður varðveitt ella hildið verður fram við ló~~ø~~gligari nýtslu av eini ogn.
Um ikki annað er ásett í býarskipan ella byggisamtykt, er herumframt

galdandi fyri verandi bygging:

a) Á grundstykki, sum er minni enn 300 $m^2$, kann vera loyvt at byggja afturat verandi húsum, um nýtingarstigið ikki fer upp um 0,5.

b) Nýtingarstigið fyri verandi hús á grundstykkjum millum 300 og 500 $m^2$ verður minkað lutfalsliga frá 0,5 til 0,3 (mynd 4.3).




Mynd 4.3

c) Loyvt kann vera at byggja aftrat verandi húsum nærri enn 2,5 m, um so er, at í minsta lagi 5 m verða til grannahús, og um granni, sum markar ímóti, skrivliga játtar hesum.

d) Í samband við umbygging ella aftratbygging til verandi hús kann byggivaldið krevja, at bilstøðlar verða gjørdir til hvønn bústað.

~~**6. gr. Raðhús og onnur samanbygd hús.**~~

~~Tá fleiri enn tvey hús verða bygd saman í náttúrliga avmarkaðum økjum í kommununi, skal serstøk byggisamtykt gerast fyri hesi økini.~~

**V. KAPITTUL**

**V. KAPITTUL**
**VEGIR.**

**1. gr. Orðaskiljingar.**

1. Sum *vegur* er at skilja eitt øki, sum er lagt av ella gjørt til veg, íroknað gøta (ið er at skilja sum vegur fyri fótferðslu), tún og pláss.

2. Øki verður roknað fyri at vera *lagt av til veg*, tá ið:
   a) almenningurin ella fleiri enn ein luteigari hava rætt til ferðslu á økinum
   b) øki við býarskipan, tinglýsing, hevd ella matrikli er tryggjað til framtíðar nýtlsu sum vegur.

3. Øki verður roknað at vera *gjørdur vegur*, tá ið
   a) økið verður nýtt til ferðslu av almenningi ella av luteigarum, sum hava rætt til tess.
   b) økið er greitt til ferðslu við merking ella á annan sjónligan hátt til endamálið.

4. *Miðlinja* á vegi verður tilskilað av byggivaldinum. Miðlinja á landsvegi verður tilskilað av Landsverk~~frøðinginum~~.

5. *Byggilinjur* eru linjur fram við vegum, gøtum, áum, kraftlinjum o.t., sum einki punkt á bygging má fara um, burtursæð frá frávikunum, ið nevnd eru í IV kap. 4. gr., 13. stk.

**2. gr. Um at leggja av til og gera vegir.**

1. Vegabreiddir:
   a) Vegir í einum býlingi ella bygd verða avlagdir í minst 10 m breidd, av hesum til akbreytir 6,0 m. Byggivaldið kann tó loyva, at til vegir, ið eftir meting tess ikki fara at hava ferðslutýdning, verður avlagda breiddin sett niður í 8,0 m, av hesum til akbreyt 5,0 m.
   b) Um vegur bert gevur atgongd til í mesta lagi 5 grundir, kann byggivaldið tó loyva, at avlagda breiddin verður sett níður í 5,0 m.
   c) Vendipláss skulu í minsta lagi vera avløgd í 12 m breidd.
   d) Gøtur skulu verða avlagdar í minst 1,5 m breidd.

2. Áðrenn lagt verður av til nýggjan veg ella vegur sum er, verður breiðkaður til tær í 1. stk nevndu breiddir, skal planur í máti 1:1000 verða lagdur fyri b~~ýygda~~ráðið, og planurin skal verða góðkendur av avvarðandi vegamyndugleika viðvíkjandi legu, leið og sambandi við áður góðkendan veg.

3. Vegur skal verða gjørdur samsvarandi projekti, sum avvarðandi vegamyndugleiki hevur góðkent.

4. B~~ýygda~~ráðið ásetur, í hvønn mun og nær teir vegir, sum eitt grundstykki

liggur út móti, skulu verða gjørdir.

**3. gr. Byggilinjur.**

1. Byggivaldið kann krevja, at bygging við verandi veg - við seinni breiðking í huga - skal hava ein fráleika upp til 12,5 m frá miðlinju á vegnum.

2. Tá ið tað snýr seg um landsvegir, ger landsvegamyndugleikin í samráð við b~~ýygda~~ráðið av, hvussu stórur fráleikin frá vegmiðju skal vera.

3. Tá ið byggivaldið smb. 1. og 2. stk. hevur kravt, at byggingin verður flutt aftur frá verandi veglinju, kann verða kravt, at økið millum hesa veglinju og framtíðar veglinju verður latið til breiðkan av vegnum.

**4. gr. Ymisk loyvi til serliga nýtslu av vegnum.**

1. Í tey øki, sum hoyra til einstaklinga og almennar vegir, kunnu, sjálvt um tey bara eru løgd av og ikki gjørd til veg, verða løgd leiðingar og kaðalar og sett tílík virki, sum eftir ætlan byggivaldsins eru neyðug ella hent. Teir, sum eiga slík øki, hava skyldu til at geva atgongd til tey í tann mun, neyðugt er til eftirlit og ábøtur á hesum virkjum. Tó skal, áðrenn farið verður undir arbeiðið, altíð verða gjørdur sáttmáli frammanundan viðvíkjandi møguligum endurgjaldi fyri skaðar, ið standast av hesum.

2. Verður hildið neyðugt at flyta leiðingar, kaðalar, standarar o.a., við tað at bygging fer fram, skal hann, sum byggir, endurgjalda kommununi ella øðrum avvarðandi stovni útreiðslurnar av hesum eftir rokning. Sama er við øllum eykavegarbeiðum, ið standast av byggingini, og sum verða gjørd eftir kravi frá byggivaldinum.

**5. gr. Hornaavskurðir og útsýnisøki.**

1. Tá ið grund hevur markaskil móti vegum og hesir skerast við einum horni, ið er minni enn 135°, skal hetta hornið verða skorið av við eini linju, sum ger javnstór horn við báðar veglinjurnar, og sum í eldri og nýggjari býlingum skal vera í minsta lagi 3 ávikavist 5 m (sí mynd 5.1).




Mynd 5.1

2. Við íbinding av vegi skulu í nýggjum býlingum verða ásett útsýnisøki,

har eingin lutur av bygging, girðing ella vøkstur verður hægri enn 1 m yvir hæddarstrikuni mitt eftir vegnum frammanfyri útsýnisøkið.

3. Útsýnisøkið við teir vegir, sum nevndir eru í 2. gr., 2. stk. a. verður avmarkað av linju, sum skal binda tvey punkt á akbreytarjarðanum saman. Haðani jaðrðarnir koma saman og til hesi punkt verða ávikavist 15 og 60 m, har 60 m verða roknaðir eftir tí meira týdningarmikla vegnum. Er annar vegurin landsvegur, verður fráleikin øktur til 20 og 100 m (sí mynd 5.2). Fyri teir vegir, sum nevndir eru í 2. gr., 2. stk. b. verða hesir fráleikar settir til 15 og 30 m.
   Fyri teir vegir, sum nevndir eru í 2. gr., 2. stk. c. verða hesir fráleikar ásettir av byggivaldinum.




Mynd 5.2

**6. gr. <u>Avtøka av vegum.</u>**

1. Byggivaldið kann, tá ið serstøk byggisamtykt er gjørd, gera av, at verandi vegir og útkoyringar verða niðurløgd ella umskipað, tá ið onnur vegatgongd verður tryggjað avvarðandi ognum.

2. Ikki er loyvt at steingja veg við bummum ella á annan hátt byrgja fyri almennari ferðslu uttan samtykki frá byggivaldinum ella løgregluni. Hetta samtykkið kann verða tikið aftur.

**7. gr. <u>Girðing út móti vegi.</u>**

Byggivaldinum er heimilað at gera av, um grundstykki skal verða girt út móti vegi, sum liggur framvið, ella um markið millum grund og veg skal verða greitt á annan hátt. Av hvørjum slag og hvussu høg girðingin skal verða, ger byggivaldið av, og farið verður eftir, hvat grundin er nýtt til.

**VI. KAPITTUL**

**VI. KAPITTUL**

**AÐRAR ÁSETINGAR.**

**1. gr. Ásetingar viðvíkjandi húsabygging.**

Lógarheimildir og tilvísingar fyri hesi almennu byggisamtyktini er ávikavist:

1. Løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.
2. Løgtingslóg nr. 60 nevnd Løgtingslóg um at byggja bygningar o.a. 'byggilógin' frá 15. mai 2012
3. Kunngerð um bygningskunngerð 2017 frá 27. Juni 2016
4. Bygningskunngerðin 2017 ella nýggjasta útgávan av hesi kunngerð.

~~Viðvíkjandi~~

- ~~almennu ásetingunum um húsabygging,~~
- ~~ásetingum um innrætting av húsum,~~
- ~~ásetingum um konstruktión, styrki, lastir, avbyrging móti slavi og slevju, bjálving, eldverju, tekniskum ásetingum o.t.,~~
- ~~kunngerð um brunaverju og brunatrygd lýst í Kunngerðablaðnum A  hefti 14, 1992 og~~
- ~~øðrum almennum ásetingum um bygging verður víst til donsku byggireglugerðina.~~

**VII. KAPITTUL**
**ÁSETINGAR FYRI TEY YMISKU ØKINI.**

**1. gr. Almennar fyriskipanir.**

1. Lógarheimildir:
   Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum verða hesar ásetingar at galda sum víst á hjálagda korti fram um tær ásetingar á somu økjum, sum nevndar eru í almennu ásetingini fyri byggisamtyktina.

2. Samtyktin fevnir um hesi endamál:
   a) Sethús, rað- og randarhús, íbúðarbygging, almennar stovnar, fornminni og siðsøgu, ítrótt, mentanar- og átrúnarligt, vinnuendamál og neyst, koyri- og gonguvegir, almenn frítíðarøki, frílendi og landbúnað.
   a) Sethús, almennar stovnar, vinnuendamál og neyst, koyri- og gonguvegir, almenn frítíðarøki, frílendi og landbúnað.
   b) Økini hava hesi heiti: A, A1, A2, B, B1, D, D2, D3, D4, D5, D6, E, E1, E2, F, F1, F2, G, H og J.

3. Byggilinjur:
   a) Byggilinjurnar eru at skilja sum fráleikamark við teimum frávikum, sum nevnd eru í almennu ásetingunum fyri byggisamtyktina.
   b) Byggilinjur skulu ikki skiljast sum reglur um byggiflukt (rætning á húsum).

**2. gr. Ásetingar fyri A-økini.**

Øki A:
   a) Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. til tænastumerktar fyritøkur sum umsiting, handlar, skrivstovur, heilsubótastovu, stovnar, fornminni, tún, parkering, felags vesi og tílíkar smærri almannagagnligar tænastubygningart.
   b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um eitt náttúrliga avmarkað øki, og sum býygdaráðið góðkennir.
   c) Størsta loyvda byggistig er 0,4.
   d) Hægsta loyvda bygningshædd móti vegi (vestursíðan av bygninginum) til yvirgrindina er 7 m. Hædd til hægsta loyvda punkt á taki er 9 m.
   e) Bert ein kjallarahædd er loyvd.
   f) Nýtingarstigið fyri øki kann ikki fara uppum 1,0.Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í stk. a. og b. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 0,8.

Øki A1:

a) Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. handlar, sethús og verkstøð og líknandi
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um eitt náttúrliga avmarkað øki, og sum býygdaráðið góðkennir.
c) Størsta loyvda byggistig er 0,4.
d) Hægsta loyvda bygningshædd móti vegi (eystursíðan av bygninginum) til yvirgrindina er 3,5 m. Hædd til hægsta loyvda punkt á taki er 3,0 m yvir yvirgrindini.
e) Bert ein kjallarahædd er loyvd.
f) Nýtingarstigið fyri øki A1 kann ikki fara uppum 1,0. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í stk. a. og b. í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 0,8.

Øki A2:
a) Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. til tænastumerktar fyritøkur sum umsiting, handlar, skrivstovur, heilsubótastovu, stovnar, fornminnir, íbúðir, raðhús, randarhús og líknandi.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um eitt náttúrliga avmarkað øki, sum bygdaráðið góðkennir.
c) Stórst loyvda byggistig er 0,64
d) Hægsta loyvda útsíðuhædd (fasaduhædd) móti vegi (vestursíðan av bygningunum) til yvirgrindina er 10 m
e) Hægst loyvda hædd frá vegi til hægsta punkt á tekju er 12 m.
f) Nýtingarstigið fyri øki A2 kann ikki fara uppum 1,2.Frávik kunnu gerast frá ásetingunum í stk. a og b. við gerða av serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt og náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettunýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,2

**3. gr. Ásetingar fyri B-økini.**

Øki B:
a) Økið verður nýtt til sethús, tvíhús, raðhús, randarhús, íbúðir og tílíkir bústaðarbygningar.
a) Økið verður nýtt til stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan fyri eitt náttúrligt avmarkað øki.
c) Byggi- og nýtingarstig samsvarandi kap. 4, 1., 2. og 3 gr.
d) Húsdjór ella fenaður á kommunalum útstykkingum og tættbygdum økjum, skulu ikki vera til ampa fyri grannan.
e) Grundstykkini skulu í minsta lagi verða 500 m2 til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggjað ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús (einhúskishús) og 300 m2 fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

f)e)Loyvt er at hava handil og vinnuvirki, í tilknýti til verandi sethús, um tað ikki órógvar grannalagið við lukti, gangi ella forðar fyri vanligari ferðslu til búðstaðarøkið og um nøktandi bilstøðlar eru..

f) Bygningar í øki B skulu fylgja ásetingunum í kapitli IV gr. 4

g) Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttari loftshædd og mugu ikki verða hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m til mønu, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahornini). Loftið í kjallara má ikki vera meira enn 1,0 oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má verða.

Øki B1:

a) Økið verður alt sum tað er lagt til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging.
b) Endalig ætlan fyri alt økið verður at viðgera í serstakari byggisamtykt.
c) Nýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.
d) Hús kunnu einans verða bygd í í mesta lagi 3 hæddum við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 10,0 m til yvirgrind og 13 m til mønu mált frá miðal jørðildi (miðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður sum húsahædd um so er, at loftið er meira enn 1,0 m omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.

### 4. gr. Ásetingar fyri D-økini.

Øki D:

a) Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
b) Byggingarstigið fyri havnaøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.
c) Rúmmát av húsinum má ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.
d) Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 10 m yvir liðugt kajdekk (miðal við húsahornini).
e) Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri markið enn 5 m, minsti fráleiki millum bygningar 10 m.
f) Á hesum økinum er ikki loyvt at innrætta bústaðir.
g) Býygdaráðið kann tó geva loyvi til, at partur av eini bygging kann verða hægri enn teir ásettu 10 m, eitt nú tekniskur útbúnaður ella líknandi. Hetta er galdani fyri øll D økini uttan D3.
h) Økini verða løgd burturav til fergulegu og bilstøðlar.
i) Útstykking kann ikki fara fram.

Øki D2:

a) Økini verða løgd burturav til havnaendamál, so sum bátahavn, handverk, maskinverkstað og til ídnað, sum hevur tilknýti til økið, tænastufyritøkur, bátapláss, bilstøðlar og tílíkt.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um alt økið og sum býygdaráðið góðkennir.
c) Størsta loyvda byggistig er 0,4.
d) Størsta loyvda nýtingarstig er 0,8.
e) Einkið hús má vera hægri enn 8 m til yvirgrind og 10 m til mønu, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahorn).

f) Hús mugu ikki verða sett nærri bryggutrom enn fyriskipað er av avarandi havnamynduleikum í vegleiðandi ætlan galdandi fyri økið.

Øki D3:

a) Økini verða løgd av til havnaendamál, sum bátahavn, bátapláss, bilstøðlar og tílíkt.
b) Verandi handilsbygningur er náttúrligur partur av økinum.
c) Útstykking kann ikki fara fram.

Øki D4:

a) Økið verður lagd av til havnaendamál og ídnaðarøki.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um alt økið og sum b~~ýygda~~ráðið góðkennir.
c) Stødd av grundstykkjum millum 1000-2000 m2.
d) Størsta loyvda byggistig er 0,4.
e) Størsta loyvda nýtingarstig er 0,8.
f) Einki~~ð~~ hús má vera hægri enn 10 m til yvirgrind og 12 m til mønu, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahorn).
g) Hús mugu ikki verða sett nærri bryggutrom enn fyriskipað er av avarandi havnamynduleikum í vegleiðandi ætlan galdandi fyri økið.

Øki D5:

a) Økið er avsett til handverksvinnu, lættari ídna, heilsølur og líknandi og til innrætting av bústaði tengdan at hesum.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um um alt økið og b~~ýygda~~ráðsins góðtøku.
c) Byggi~~ngar~~stigið má ikki fara upp um 0,4
d) N~~etton~~ýtingarstigið  má ikki fara upp um 0,8
e) Rokna frá miðaljørðildi og vegi mega bygningar ikki vera hægri enn 8,0 m til yvirgrind og 10 m til mønu.
f) Byggjast kann ikki nærri marki enn 5m og fráleikin millum bygningar skal ikki vera minni enn 10m
g) Grundstykkir mega ikki vera minni enn 1000 m2.

Øki D6:

a) Økið er avlagt til frítíðarøki.
b) Fjøran skal nýtast til frítíðarvirksemi, og skal verandi sjóarmáli varveitast í verandi sniði og útsjónd.
c) Bátadráttir og neyst kunnu gerast á økinum.
d) Pierurin norðanfyri er at roknað sum partur av ‘marinuni við Rætt’, og verður loyvt at seta bygningar til frítíðarvirksemi á økið.
e) Byggi~~ngar~~stigið má ikki fara upp um 0,4.

**5. gr. <u>Ásetingar fyri E-økini</u>.**

Øki E:

a) Økið verður lagt av til almennar stovnar, so sum eldrasambýli, eldraíbúðir, ~~(~~mentanarlig og átrúnaðarlig endamál~~)~~.
b) Byggi~~ngar~~stigið má ikki fara upp um 0,4.
c) N~~etton~~ýtingarstigið má ikki fara upp um 0,8.

d) Tað er bert loyvt at byggja slíkt, sum er neyðugt til almennar veitingar.
e) Hús kunnu bara verða bygd eftir eini byggiætlan, sum býygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki.

Øki E1:

a) Økini verða løgd av til almennar stovnar til undirvísingar og tílíkt.
b) Útstykking má ikki fara fram innan fyri økið.
c) Bygg~~ingar~~stigið má ikki fara upp um 0,4.
d) Nýtingarstigið má ikki fara upp um 0,8.

Øki E2:

a) Økini verða tilskilað átrúnarligum endamálum, og innan fyri tey einstøku økini mugu bert verða reistir bygningar, sum tæna slíkum endamálum.

## 6. gr. Ásetingar fyri F-økini.

Øki F:

a) Økið verður lagt av til ítróttarhøll, ítróttarvøllir, bygdahús, spælipláss, parkeringspláss, útiverðupláss o.t.
b) Innan fyri økini mugu bara verða gjørd virki ella hús, ið samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við tey.
c) Hús kunnu bara verða bygd eftir byggiætlan, sum býygdaráðið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað størri øki.

Øki F1:

a) Økið er mentanarligt og søguligt.
b) Tað er bert loyvt at byggja hús, sum hava tilknýti til økið, við loyvi frá avvarandi myndugleikum.

Øki F2:

a) Økið er søguligt.
b) Tað er bert loyvt at byggja hús, sum hava tilknýti til økið, við loyvi frá avvarandi myndugleikum.

## 7. gr. Ásetingar fyri G-økini.

Øki G:

a) Økið verður nýtt til neyst og havnarlag í samband við hetta.
b) Bygging kann bert fara fram eftir útstykkingarætlan, sum fevnir um alt økið og samsvarar við pkt. c og d í hesum stk.
c) Skjøldrar skulu vera millum 3 og 4 m breiðir.
d) Neystini skulu standa “lið um lið” við skjøldri móti sjónum.
e) Neyðugar gøtur kunnu tó vera ímillum. Neystini skulu hava mønu og takhall millum 35 og 50 stig, tó vegleiðandi skal vera “triðingsreyst” (uml. 42 stig). Hædd frá lidnum lendi við niðara enda til yvirgrind skal í mesta lagi vera 4,5 m.
f) Stødd av neysti max. 40 m2 (4x10m)

**8. gr. Ásetingar fyri H-økini.**

a) Økið H er tað sum eftir er av kommununi tá ið frammanundan nevndu økini eru tikin frá og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.
b) Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í pkt. a). Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband.
c) Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.
~~c)~~d) Bygging er ikki loyvd í tilrenningarøkinum til Toftavatn, Hamravøtnini og Kornvatn.

formaterede: Skrifttype: Fed, Understregning

**9. gr. Ásetingar fyri J-økini.**

a) Frílendi t.e. lendi sum ikki má byggjast á, lutvíst eru tað lendi sum løgd eru av til varðveitan av náttúru, fornminnum o.t.
b) Á teim fyrr nevndu økjunum mugu bert verða gjørdir gonguvegir, og broytingar í plantingini kunnu bert fara fram, tá ið ein nýtingar- og plantingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrliga avmarkað, størri øki.

**10. gr. Frávik frá ásetingunum.**

a) Býráðið kann geva smávegis frávik og lættar frá ásetingunum í byggisamtyktini. Onnur frávik frá ásetingunum í byggisantyktini kunnu bert fremjast við gerð av serstakari byggisamtykt.

**VIII. KAPITTUL**
**ÚTGANGUR.**

**1. gr. Broytingar í byggisamtyktini.**

Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir viðtøku býygdaráðsins og við góðkenning landsstýrisins eftir reglunum viðvíkjandi viðtøku og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

**2. gr. Samtyktar- og góðkenningarátekning.**

Soleiðis samtykt av Nes Kommunu

Nes Kommuna, Toftir hin ___/___ 2012.28.08.2023

~~Sambært gr. 4, stk. 1. í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, góðkennir landsstýrið frammanfyristandandi av Nes Kommunu samtykta uppskot til almenna byggisamtykt fyri Nes Kommunu.~~

~~Føroya Landsstýri _____/_____2012.~~